ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Er maðurin í politikki, spyr eingin, men er tað kvinnan, verður spurt, hvør smyr matpakkarnar hjá børnunum*
*Lene Espersen*

# Ikki heimsins undirgangur

**Ein roynd at eftirgera tað sokallaða Big Bang varð sett í gongd undir jørð í Sveis fyrrapartin. Sjálvur bresturin verður ikki fyrr enn í næsta mánað**



Nakrir granskarar hava ávarað um, at royndin 90 metrar unmdir jørð á markinum millum Sveis og Frakland kann elva til heimsins undirgang, men fleiri kanningar hjá øðrum granskarum eru komnar til ta niðurstøðu, at royndin er næstan púra vandaleys.

Við at lata partiklar ferðast í ring við næstan líka nógvari ferð sum ljósferðini ígjøgnum ein 27 kilometrar langan serbygdan tunnil og so lata teir renna hvør øðrum ætla granskararnir at eftirgera umstøðurnar, sum tær vóru ella helst vóru beint eftir, at alheimurin var vorðin til. Sjálv royndin byrjar í dag, men sjálvur samanstoyturin verður ikki fyrr enn um ein mánað ella so, skrivar NTB.

Summir granskarar siga royndina vera eitt altjóða sjálvmorð, og at 10. september í 2008 kann gerast tann seinasti í søguni. Í USA hava sjey fólk roynt at fáa dómsvaldið at forða royndini, men til fánýtis.

Tey, sum hava ábyrgdina av royndini, siga haraftur-ímóti, at vandin er sera, sera lítil, men tey viðganga, at royndin kann elva til smá sokallað „svørt hol".

8.000 alisfrøðingar úr 80 londum hava arbeitt við at fyrireika Big Bang-royndina, og tað eru 20 ár, síðani fyrireikingarnar byrjaðu.

Dómadagsmaskinan, sum summi kalla royndartunnilin, hevur kostað umleið 25 milliardir krónur.

# Russland vendir rakettum ímóti verjuskjøldrinum

Russiska leiðslan umhugsar at snara sínum langtberandi raklettum ímóti teirri ætlaðu amerikonsku rakettverjuni í Eysturevropa

-Tað er ikki óhugsandi, at okkara politiska og hernaðarliga leiðsla fara at taka eina tílíka avgerð, sigur russiski generalurin Nikolaj Solovtsov. Hann er ikki tann fyrsti russiski herovastin, sum hevur nevnt, at Russland fer at taka stig, verður tann amerikanska verjuætlanin í Eysturevropa sett í verk.

USA hevur gjørt av at seta ein part av verjuskipanini upp í Póllandi og Kekkia. Tað hóvar ikki Russlandi, sum vil vera við, at amerikanska ætlanin hóttir russisku trygdina. Russiskir polkitikarar og heryvirmenn hava sagt, at Pólland og Kekkia kunnu vænta at vera russisk álopsmál í framtíðini, um tey hýsa amerikonsku rakettverjuni. Russiski sendiharrin í Hvítarusslandi segði fyri nøkrum døgum síðani, at tað kann hugsast, at Russland fer at flyta flogfør og rakettir til Hvítarusslands og Kaliningrad fyri at verja seg betur ímóti amerikonsku ætlanini.

Russiski uttanríkisráðharrin, Sergej Lavrov, fer í morgin til Póllands at tosa við polska uttanríkisráðharran, Radek Sikorski. Upprunaliga skuldi Lavrov fara til Póllands í síðsta mánað, men vitjanin bleiv útsett, tá Pólland og USA skrivaðu undir eina avtalu um at loyva USA at seta 10 verjurakettir upp tætt við polsku eystrasaltsstrondina.

# Murdoch styðjar McCain

Tann kendi fjølmiðlakongurin Rubert Murdoch verður endurgivin fyri at hava sagt, at hann vildi heldur hava Barrack Obama til forseta heldur enn Hillary Clinton, tí hann seldi fleiri bløð, tá Obama var umrøðuevni í bløðunum.

Men New York Post, sum er eitt av bløðunum hjá fjølmiðlakonginum og tað týdningarmesta av bløðum hansara í USA, at tað mælir amerikanarum til at velja John McCain til forseta. Blaðið rósar McCain fyri at hava valt Sarah Palin til varaforsetaevni, og sambært blaðnum er tað serliga trygdar-, skatta-, vinnu- og orkupolitikkurin hjá McCain og Palin, sum amerikanarar eiga at velja.



*Fjølmiðlakongurin Rubert Murdoch*
*Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Sviar endurskoða verjuna

Stríðið millum Russland og Georgia hevur gjørt, at summi av hinum grannalondunum hjá Russlandi endurskoða sín verjupolitikk. Herfyri segði finski forsetin, Tarja Halonen, at Finnland noyðist at endurskoða verjupolitkkin eftir tað, sum er hent í georgia, og í gjár segði svenski verjumálaráðharrin, Sten Tolgfors, at stjórnin í Stockholm hevur gjørt av at útseta eina avgerð um komandi útbyggingar í svenska herflotanum.

Sten Togfors segði, at stríðið millum Russland og Georgia vísti, at hóast russar ikki brúktu meiri enn einar 20.000 hermenn í átakinum, noyddu teir georgiska herin at hopa undan eftir sera stuttari tíð. Ráðharrin vildi ikki siga, hvørja verjukós Svøríki fer at leggja, men hann vísti kortini á, at síðani aldarskiftið hava sviar ikki lagt serliga stóran dent á at menna herin.

### Moussa mist tolið við palestinum

Aðalskrivarin í Arabisku samgonguni, egyptin Amr Moussa, leggur nú trýst á teir palestinsku leiðararnar fyri at fáa teir at semjast. Egyptiskir diplomatar hava fleiri ferðir roynt seg sum semingsmenn, men sambært Amr Moussa eru teir arabisku leiðararnir so troyttir av tí palestinska sundurlyndinum, at teir umhugsa at seta tiltøk í verk fyri at noyða leiðararnar í teimum báðum palestinsku rørslunum Fatah og Hamas at setast við samráðingarborðið og at finna fram til eina politiska semju um landsins leiðslu.

Amr Moussa var rættiliga avgjørdur, tá hann helt tíðindafund í gjár. Hann segði bart út, at hann var illur um, at tað skal vera so strævið at fáa teir palestinsku leiðararnar at slaka fyri at fáa eina semju.